# ítróttur

Nr. 235 • mikudagur • 6. desember 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

# Er ítróttin fyri øll



*ÍSF-forsetin sigur, at talan var um eina sera áhugaverda kongress, sum eisini gav føroysku umboðunum íblástur*

**Fyri viku síðani vóru umboð fyri ÍSF á stórari ítróttastevnu í Danmark**

ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*

Í fleiri ár hevur ein tór træta millum ítróttafólk í Danmark verið, hvørt ítróttin hevur selt sál sína. Tað vil siga, um ymsu feløgini í jagstranini eftir heiður og æru hava gloymt breiddina í ítróttaarbeiðinum.

Fyri góðari viku síðani hevði danska ítróttasambandi tí sett stevnu, har hetta evni stóð ovarliga á skránni, og millum tey innbodnu var eisini føroyska ítróttasambandi, ÍSF.

## Fríkend við fyrivarni

Heðin Mortensen, formaður í ÍSF greiðir frá, at fyri teir var talan um eina ógvuliga spennandi luttøku.

Tiltakið varð skipað soleiðis, at fundurin var átøkur einum rættarsali, har nevningar, ákærar, verjar og dómarar skuldu taka støðu til ymsar lutir innan ítróttina.

Síðani varð ákæra reist móti ítróttini, og Heðin sigur, at ákærupunktini her vóru fleiri. Millum annað varð víst á óreglusemi innan doping, um áhugaíðkarar vóru við sviðið soð, orsaka av yrkisítrótti o.s.fr.

Bólkar vórðu síðani settir at arbeiða við ymsu málunum, og at enda var so farið aftur í rættarsalin.

At enda kom so sjálvur dómurin, og Heðin sigur, at tað vóru ikki øll, sum vóru eins fegin um hendan.

Dómararnir mettu nevnliga, at tað var um reppið, at ítróttin var komin ov langt út á eggina, men niðurstøðan var tó kortini, at ítróttin var fríkend.

## Kann væl førast yvir

Spurningurin er so, um vit í føroyska ítróttaheiminum kunnu nýta eina slíka kongress til nakað konstruktivt, og tað heldur ÍSF forsetin avgjørt, at vit kunna.

– Tað er einki til hindurs fyri, at vit kunnu brúka hetta arbeiði beinleiðis í føroyskum ítrótti, tó at støddin her sjálvandi er minni. Vit eru so smátt við at fáa somu spurningar her heima. Ikki minst í spurninginum millum áhuga- og yrkisítrótt. Her er jú sera umráðandi, at tað ikki verður soleiðis, at breiddin situr á síðulinjuni og hyggur at, meðan tað bert er elitan, sum kappast. Hetta er jú ikki málið hjá ítróttinum, sum eigur at vera fri øll, sigur hann.

Heðin leggur afturat, at tað eisini er ein spurningur, um vit her ikki áttu at gjørt eitt líknandi ting, har øll fingu høvi at siga sina hugsan, soleiðis at sambandi millum einstøku feløgini og ítróttaleiðarar kanska kann betrast.

# FCK í vøkstri



*Flemming Østergaard heldur tað ikki verða ógjørligt at kappast við stóru útlendsku feløgini*

**Stjóri felagsins, Flemming Østergaard, vil sammetast við stóru útlendsku feløgini**

DANMARK
*Jákup Mørk*

Meðan stórur partur av donsku superliguni hevur stórar fíggjarligar trupulleikar í hesum døgum, er øðrvísi statt hjá FCK. Felagið har Todi Jónsson dagliga hevur sína gongd.

Síðani teir fyri fáum árum síðani keyptu tjóðarvøllin, Parken, hevur felagið havt risayvirskot á hvørjum ári, og enn tykist eingin steðgur at vera í hesum.

## 200 mió.kr.

Sostatt sigur Flemming Østergaard við danska dagblaðið, BT, at hann er sannførdur um, at um fá ár er felagið tvífalt so stórt, sum tað er í løtuni.

Eginpeningurin hjá FCK kemur í hesum mánaðinum upp um tær 200 mió.kr., og í Danmark er so einki annað lið, sum kann breggja sær av slíkum tølum.

Tað er nú heldur ikki við donsk lið, at teir í FCK vilja sammetast. Flemming Østergaard sigur, at hann metir tað vera gjørligt, at skapa eitt danskt ítróttafelag, sum er á hædd við stóru útlendsku feløgini. Hann leggur afturat, at hetta sjálvandi ikki kann gerast í einum, men upp á sikt heldur hann hetta vera gjørligt.

## Ein samlað ávirkan

Til hetta krevjast pengar, og her er munur á, hvat eitt danskt og t.d. eitt enskt felag hava møguleika at forvinna.

Sjónvarpspengar og aðrar fótbóltsinntøkur eru so nógvar ferðir størri í bretskum fótbólti, men hinvegin hevur FCK so eisini aðrar inntøkumøguleikar.

Sambært útrokningunum hjá BT er tað soleiðis, at fótbóltsvirksemi felgsins gevur eitt hall upp á uml. fýra mió.kr., men at hetta so verður vunnið inn aftur aðra staðni í virkinum.

Flemming Østergaard er tó ikki samdur í hesum. Hann sigur, at tað so at siga er ógjørligt at býta roknskap felagsins upp í deildir, og siga at so og so stórur partur av inntøkum ella útreiðslum kemur úr tí og tí partinum av virkseminum.

Hann sigur, at tað er samlaða virksemi felagsins, sum skapar eina sonenvda »synergi-effekt«, soleiðis at samlaða úrslitið gerst positivt. Sum dømi um hetta nevnir hann Parkina. Áðrenn FCK keypti tjóðarvøllin, var talan um stór undirskot á hvørjum ári, men síðani hetta hevur talan bert verið um yvirskot, og onnur feløg hava øvunda FCK møguleikarnar, sum teir við hesum hava fingið.

## Úrslitini um at koma

Hvørt teir nógvu pengarnir hjá FCK so eisini eru nóg mikið til, at felagið í ár kann toga seg heilt upp á fótbóltstindarnar, fer tíðin at vísa.

Tað tykist tó vist, at nógvu íløgurnar í leikarahópin nú eru um at geva avkast. Úrslitini eru betri, enn tey hava verið í nógv ár, og júst hesi mugu metast at vera týdningarmesti parturin hjá einum felag, sum vil sammetast við tey stóru í Europa.

## Coca-Cola Cup í Runavík

Innandurafótbólturin er í hæddini, og um vikuskiftið verður enn ein kapping av slagnum fyriskipað.

Hesu ferð er tað B68, sum hevur sonevndu Coca-Cola Cup kappingina, og fer hendan fram í Ítróttahøllini í Runavík.

Níggju aldursbólkar eru í kappignini. Fýra hjá gentum og fimma hjá dreingjum, og er seinasta freist fyri tilmeldan í dag, mikudagin.

**jm**



# Russiskur venjari til Havnar Svimjifelag

**Havnar Svimjifelag hevur gjørt sáttmála vi› russiskan svimjivenjara**

SVIMJING
*Jákup Mørk*

Talan er um 30 ára gamla Len Sterlin, sum umframt at hava tiki› venjaraútbúgving í Russlandi, eisini hevur veri› í USA og nomi› sær vi›ari útbúgving innan ítrótt.

Harumframt hevur hann eisini virka sum venjari í N‡ Sælandi í tvey ár, á›renn hann nú kemur til Føroya, har hann hevur gjørt ein f‡ra ára sáttmála vi› HS.

Len Sterlin er giftur 26 ára gomlu Mariu, og eisini hon hevur gjørt sáttmála vi› Svimjifelagi›.

Eins og ma›urin er hon útbúgvin innan ítrótt, og sum aktiv hevur hon millum anna› vunni› økiskappingina fyri Moskva í útlopi. Hetta er ein táttur, sum líti› og einki hevur veri› gjørt vi› her heima, men hetta ætla tey í HS nú at broyta.

## Eisini triathlon

Umframt á›urnevndu førleikar, so er Len Sterlin eisini útbúgvin triatlonvenjari.

Triatholn er n‡ggj ítróttagrein á komandi oyggjaleikum, og vi› n‡ggja venjaranum er nú líkt til, at føroysku í›kararnir hava møguleika fyri enn betri venjing á hesum øki.

Kári Hentze sigur vegna Havnar Svimjifelag, at tey eru fegin um n‡ggju venjararnar, men leggur afturat, at ta› hevur veri› alt anna› lætt at fingi› tey hendan vegin.

Hann vísir á, at størsti trupulleikin í hesum sambandi hevur veri›, at felgai› ikki hevur havt nóg gó›ar venjingarumstø›ur, men at hetta er ein spurningur, sum arbeitt ver›ur av øllum alvi fyri at loysa.

Sáttmálarnir vi› Len og Mariu Sterlin eru galdandi í f‡ra ár.

# Føroyingar best í Danmark

**Fyri viku sí›ani var DM-kapping i svimjing fyri li›, og á vinnandi li›num vóru ikki færri enn tveir føroyingar**

SVIMJING
*Jákup Mørk*

um vit hava nevnt fyrr, so hev›i Havnar Svimjifelag sent nakrar av svimjarum sínum til Danmarkar, tá DM fyri li› var› hildi› fyri viku sí›ani.

Hetta var› gjørt í samstarvi vi› Brøndby Vester, og hev›i Havnar Svimjifelag sent tríggjar svimjarar hjá bá›um kynum til kappingina.

Karin Gaardlykke, Rannvá Jacobsen og Katrin Sørensen luttóku í bólkinum, sum rópast fjór›a deild, og teimum eydna›ist at tryggja sær uppflytan til tri›ju deild.

Bogi Lenvig, Jógvan Joensen og Dia Jacobsen luttóku í a›ru deild, og her var um reppi›, at eisini teir tryggja›u sær uppflytan. Teir luttóku í endaligu kappingini um at tryggja sær uppflytan, men longu enn næstan komu teir tó ikki.

Í hesum sambandi skal nevnast, at bæ›i Bogi Lenvig og Jógvan Joensen vi› tí›unum í kappingini longu hava tryggja› sær pláss á føroyska svimjilandsli›num, sum komandi ár fer til Oyggjaleikirnar.

## Vunnu DM

Í bestu deildini var eingin ivi um, hvør fór at gerast endaligur vinnari.

Swim-Team West úr Esbjerg vann so ruddiliga kappingina, og vi› føroyskum eygum má hetta metast sum stórhending. Á li›num hjá Esbjerg eru nevnliga tveir føroyingar, Ásbjørn Hansen og Eivind Eysturoy.

Bara ta› at teir hava megna at vinna sær pláss á li›num ver›ur rokna› sum eitt stórt avrik, og fyri føroyskar svimjarar kann hetta bert vera orsøk til íblástur.

# Nósakapping hjá B36

INNANDURA
*Jákup Mørk*

Um vikuskifti› hev›i B36 árligu nósakappingina, har børn og ung í ymsum aldursbólkum dysta›ust í innandura fótbólti.

Undan kappingini høvdu ikki færri enn 95 li› tekna› seg, men vegna avbo› frá fleiri av hesum var› samla›a luttakaratali› knappliga 80 li›.

Sjálv kappingin gekk annars væl at avgrei›a, soleiðis at talan ikki gjørdist um alt ov nógvar seinkingar av ymsum slag.

Eftir kappingina var› skipa› fyri barnadiiskoteki í B36-húsinum, og sum skilst, rigga›i hetta somiki› væl, at tey í B36 ætla, at hetta eisini skal gerast partur av komandi kappingum.




*Hjá elstu gentunum var› ta› B36, sum vann kappingina*




*Í smádreingjadeildini enda›i FC Æsir á ovasta plássinum*




*B36 2 vann kappingina hjá gentum 10-12 ár*




*Li›i›, sum rópti seg Frankaríki vann kappingina hjá pinkulingum*



*AFC Ajax vann unglingadeildina*



*Í dreingjadeildini vann samansetta li›i›, B36/HB*



*Vinnarar av piltadeildini gjørdist AB*



*Kappingina hjá smágentum vann HB*




*Barelona gjørdist bestir í kappingini hjá smápiltum*